Veljarakanningar ov líti› ítøkiligar

VELJARAKANNING
Jan Müller

Sí›ani Fynd fór undir veljarakanningar hava veri› ymsar ásko›anir frammi um slíkar kanningr, eitt nú hvussu hesar kanningar eiga og ikki eiga at fyriskipast. Forma›ur Javna›arfloksins er ein teirra, sum á›ur hevur funnist at kanningunum, og heldur ikki eftir hesa seinastu kanningina er hann heilt nøgdur.

– Hyggur man eftir úttalilsunum, sum eru komin eftir veljarakanningarnar, so er ta› ótrúligt at hoyra, at allir flokkar eru komnir væl burtur úr kanningini. Men øll vita, at framgongd hjá nøkrum, má merkja afturgongd hjá ø›rum, tí man hevur bert eina ávísa nøgd at taka burtur úr.

Jóannes Eidesgaard heldur, at hetta prógvar, at veljarakanningarnar eru rættiliga ókonkretar. Spurningarnir eru rætt og slætt ikki nóg konkretir. – Hyggur man eftir veljarakanningum a›rasta›ni so kann man síggja gongdina frá eini veljarakanning frammanundan og ikki einum vali. Nú tosar man um, at td. Sambandsflokkurin hevur størstu framgongdina, men hyggur tú eftir, hvussu hann hevur klára› seg sí›ani seinastu veljarakanning, so hevur hann eina stóra afturgongd. Og sambandsmenn úttala seg bara um sína stóru framgongd í mun til seinasta val. Javna›arflokkurin hevur eisini afturgongd í mun til seinastu veljarakanning. Eg haldi ta› tí er umrá›andi hava hava úrslitini frá seinastu veljarakanning vi›, tá ein n‡ggj kanning ver›ur gjørd og kunngjørd.

Jóannes Eidesgaard f‡list eisini á, at ta› í ein veljarakanning, sum ver›ur gjørd av einum óheftum politiskum stovni, ver›a tiknir tveir kandidatar í einum flokki sum møgulig løgmansvalevni.

– Fynd átti at vita›, at atkvø›ir tú fyri einum sambandsmanni til løgmann, so eitur hann Edmund Joensen, tí hann er forma›ur í flokkinum. Og ongum ø›rum.

Seinasta n‡ggja er annars, at næmingar á Fró›skaparsetrinum gera eina n‡ggja veljarakanning fyri Dimmalætting. Her er talan um ikki færri enn 28 spurningar, sum bæ›i vi›víkja løgting- og kommunalvalum.

Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins

Rørlei›ing frá Clair til Sullom Voe

Kann fáa t‡dning fyri komandi oljukeldur á føroyskum øki í framtí›ini

OLJULEITING
Jan Müller

Um ikki so langa tí› ver›ur avgjørt, hvussu framlei›slan frá risastóra oljufeltinum Clair vestan fyri Hetland skal fara fram, tá fyrsta oljan rennur í 2003. BP hevur avgjørt at útbyggja ein part av feltinum nevndur Su›ur-Clair, i› rúmar einar 200 milliónir tunnur av olju. Alt felti› er mett at goyma einar 6 milliardir tunnur. Nú skjøtil ver›ur settur á hetta felti›, i› var› funni› í 1978, meta serfrø›ingarnir hjá BP um, antin teir skulu hava ein framlei›slupall á sta›num og sí›ani flyta oljuna vi› sokalla›um Shuttleskipum til lands ella um teir skulu leggja eina rørlei›ing á havbotnin. Bla›i› Uppstream vil vera vi›, at BP meira ella minni hevur avgjørt at taka av rørlei›ingsloysnini, tí hon ver›ur tann skilabesta uppá longri sikt. Her ver›ur hugsa› um, at a›rir partar av hesum stóra oljufelti ver›a tiknir uppí og sí›ani eisini a›rar keldur í grannalagnum.

Ta› er greitt, at ein slík avger› hevur eisini óbeinlei›is t‡dning fyri komandi oljuvirksemi á føroyskum øki. Tí enn finst eingin infrastrukturur í økinum vestan fyri Hetland ella eystan fyri Føroyar. Ein rørlei›ing frá Clair til Sullom Voe kann gera allan henda n‡ggja oljulandspartin meira áhugaverdan og lønandi. Og ta› er ikki óhugsandi, um oljufelt ver›a funnin føroysku megin marki›, at hesi feltini kunnu bindast í oljulei›ingar, sum ver›a lagdir á botn frá bretskum keldum og til Hetlands.

Sosialurin skilur, at hetta eru eisini spurningar, sum eru frammi á teimum fundum, sum eru millum føroyskar og bretskar oljumyndugleikar. Hóast ta› at hetta enn er sera líti› ítøkiligt, so kann hetta blíva aktuelt og av stórum vir›i um ikki so mong ár, at rørlei›ingar til bæ›i olju og gass ver›a lagdir frá bretsku keldunum og til lands. Tí tá kann ver›a lætt at kn‡ta møguligar oljukeldur á føroyska landgrunninum uppí bretska infrastrukturin.

Skeivt at binda komandi ættarli› vi› fólkaatkvø›u

– Eg haldi ikki, at man skal taka avger›ir í dag fyri ta›, sum skal henda um15-20 ár. Ta› er ósakligt og eitt sindur politiskt ómoralskt at gera ta› sigur Jóannes Eidesgaard, forma›ur Javna›arfloksins um komandi fólkaatkvø›una

FÓLKAATKVØ‹A
Jan Müller

Hóast nógv ver›ur tosa› um ta komandi fólkaatkvø›una, sum samgonguflokkarnir herfyri vór›u samdir um at halda í apríl næsta ár, so hevur líti› ítøkiligt veri› frammi um, hvat henda fólkaatkvø›a skal innihalda. Vit spurdu formann Javna›arfloksins um flokkurin fer at mótarbei›a komandi fólkaatkvø›uni ella vilja tit fara inn aktivt og royna at ávirka spurningarnar í henni?

– Ta› er ov tí›liga at siga, hvussu okkara leiklutur ver›ur til fólkaatkvø›una. Nú er hon gott nokk ein spurningur, sum var vi› í seinastu veljarakanningini. Sjálvur haldi eg ta› er eitt sindur óseriøst at seta veljarunum spurningin um eina fólkaatkvø›u í apríl og sum man í dag als ikki kennir innihaldi› av. Hvat er ta› vit fara til fólkaatkvø›u um?

Ein fólkaatkvø›a er gjarna at taka stø›u til eitt mál, sum er li›ugt vi›gjørt. Ein stjórn hevur antin vi› samrá›ingum ella í a›rar mátar arbeitt seg fram til eitt úrslit, men av tí at úrsliti› fær so stórar fylgjur fyri samfelagi› og borgararnar, vil man líka hava fólksins gó›kenning av tí. Men ta› ver›ur ta› ikki talan um hesafer›. Nú ver›ur ta› meira talan um at leggja ein handlingsplan fram til eina fólkaatkvø›u. Og ta› er í sjálvum sær rættiliga n‡tt og ókent her um okkara lei›ir sigur forma›ur Javna›arfloksins og heldur fram:

– Alt eftir hvat innihaldi› ver›ur vil man so taka stø›u út frá tí. Sigur man sum Tjó›veldi› vil ta›, at fullveldi› skal vera veruleiki innan ta› ella ta› árstali›, so kann eg síggja, at vit hava ringt vi› at bi›ja fólk stu›la fólkaatkvø›uni. Tann avger›, sum skal fella í t.d. 2015-16-18 ella nær ta› skal vera, haldi eg føroyingar, sum tá sita vi› ábyrgd, skulu sleppa at taka avger› um. Eg haldi ikki, at man skal taka avger›ir í dag fyri ta›, sum skal henda um15-20 ár. Ta› er ósakligt og eitt sindur politiskt ómoralskt at gera ta›.

Jóannes Eidesgaard sigur ví›ari, at hetta kann lukta av, at man fer út at vinna sær eitt forlori› mandat. – Har ver›ur ein or›ing um eina intentión um føroyskt sjálvst‡ri, sum man veit, at eini 80% av føroyingum taka undir vi› og so bráddliga hevur man eitt mandat, sum sigur, at man hevur 80% av føroyingum aftanfyri seg, og nú ver›ur so fari› eftir fullveldinum. Ta› er eitt vandamál, sum vit mugu vera uppá vakt fyri.

N‡ggj stjørna í Gøtu

HT Shipping, sum er partur av Partafelagnum Heri Thomsen í Gøtu, hevur keypt enn eitt farmaskip, sum í høvu›sheitinum fer at føra alifó›ur úr Noreg til Føroya. Skipi› eitur Sirius

HT Shipping í Gøtu hevur keypt danska farmaskipi› Anne Sofie, sum nú eitur Sirius

SKIPAKEYP
Edvard Joensen

Partafelagi› Heri Thomsen í Gøtu hevur keypt danska farmaskipi› Anne Sofie úr Aalborg. Skipi› hevur skift navn og eitur nú Sirius.

Tórhallur Thomsen, rei›ari, sigur, at skipi› er keypt til at føra alifó›ur úr Noreg til Føroya. Felagi› hevur avtalu vi› fó›urfyritøkuna Ewos um fó›urflutning til føroysku alibrúkini. HT Shipping hjá Hera Thomsen eigur frammanundan farmaskipi› Skuran, sum hevur røkt hendan flutningin. Men Skurin er ov lítil, og tí er hetta skipi› nú keypt.

Um navni› sigur Tórhallur Thomsen, at ta› hava teir fingi› sær, tí ta› er lætt at siga og skriva. Stjørnunøvn kenna øll. Bæ›i føroyingar og útlendingar, og so standast ongar misskiljingar og seinkingar av tí. Eitt sindur av nostalgi er tó uppií, vi›gongur rei›arin. Onkur smábátur hjá familjuni hevur iti› Sirius, so ta› var kanska ikki so ringt at velja navn kortini.

Sirius er bygdur í Noreg í 1972. Skipi› er 61 metrar langt, 10 metrar breitt og 4 metrar djúpt. Ta› lastar 1.000 tons og gongur 10 míl. Skurin, sum felagi› framman undan eigur, lastar 660 tons.

Hóast eitt størri skip nú er keypt, fer Skurin framvegis at sigla, sigur Tórhallur Thomsen, rei›ari. Nøgdin, teir flyta, er so miki› stór, at brúk er fyri bá›um skipunum. Skurin hevur ikki klára› allan flutningin, sum veri› hevur. Restina hava teir so brúkt chartra› skip til. Men ta› hava teir ikki hildi› veri› nóg gó›a loysn.

Um prís og fígging leggur Tórhallur Thomsen ikki í at siga naka›.

Sirius er í løtuni á sleipistø› í Fredericia í Danmark, har ymiskt ver›ur gjørt vi› skipi›, á›renn ta› ver›ur sett í regluliga sigling. Bógskrúva ver›ur sett í. Hon er ney›ug, tí nógv av fó›rinum ver›ur lossa› beinlei›is til flakararnar, sum liggja vi› alistø›irnar. Og har skulu gó›ar manøvreringsgrei›ir til. Eisini ver›ur millumdekk ísett, eins og skipi› ver›ur mála› vi› ey›kenda grøna litinum hjá Thomsen fyritøkuni í Gøtu. Tíggju mans á tveimum vaktum fara at sigla vi› Sirius.

Annars er fyritøkan hjá Hera Thomsen mest kend fyri lastbilaflutning. Felagi› eigur 20 lastbilar. Og nú eisini tvey skip. Ta› starvast tilsamans 45 fólk hjá felagnum. Felagi› hevur egi› bilverksta› á Skála, har lastbilarnir ver›a umvældir. Har starvast f‡ra fólk. Fó›urgoymsla er í Turkihúsinum á Skála, har ein ma›ur er í starvi. 10 fara vi› Sirius, me›an átta eru vi› Skuranum. Á skrivstovuni vi› Gøtugjógv starvast tr‡ fólk fulla tí› og tvey hálva tí›. Restin er bilførarar, sigur Tórhallur Thomsen.

Barnaverndarøki› má skipast á ein ø›rvísi hátt

Mælt ver›ur til, at barnaverndarnevndirnar ver›a um ikki avtiknar, so samansettar av fakfólki og leikfólki, og ikki sum nú bara av leikfólki, og at sama nevnd ikki skal taka avger›ir bæ›i í álvarsligum málum og minni álvarsligum málum, stendur m.a. at lesa í frágrei›ingini um barnaforsorg

BARNASFORSORG
Ólavur í Beiti

Herfyri kom frágrei›ing um Barnaforsorg í Føroyum, nú ætlanin er at fremja broytingar á hesum øki, og sambært samandráttinum í frágrei›ingini er ta› í tøkum tíma, at broytingar ver›a framdar sum skjótast.

Frágrei›ingin sta›festir, at skipaninar rundanum okkum - í Noregi, Danmark og Íslandi - eru áhugaverdar og kunnu geva íblástur til eina n‡ggja umsiting í Føroyum.

– Í londunum kring okkum ver›ur gingi› meira og meira burtur frá at hava politiskt valdar barnaverndarnevndir, har leikfólk taka avger›ir í barnaverndarmálum. Harafturímóti er ta› í øllum trimum londunum lógarásett, at ein sosialumsiting skal vi›gera eitt barnaverndarmál, á›renn avger› ver›ur tikin. Høvu›sjónarmi›i› er, at rættartrygdin hjá bæ›i foreldrum og børnum skal ver›a sett í hásæti, sta›festir frágrei›ingin.

Sosial umsiting

Og ví›ari ver›ur sagt, at í Danmark eru allar barnaverndarnevndir, solei›is sum vit kenna tær í Føroyum, avtiknar. Í sta›in er ta› sosiala umsitingin í kommununi, sum vi›ger og tekur avger› í øllum barnaverndarmálum, har foreldrini hava givi› samtykki. Í Noregi er ta› sambært lóggávuni ein sosial umsiting í hvørjari kommunu, sum uppl‡sir máli og leggur eitt tilmæli fyri barnaverndarnevndina til stø›utakan.

– Bæ›i í Danmark og Noregi ver›ur eitt b‡ti gjørt ímillum mál vi›víkjandi tvang og mál vi›víkjandi samtykki. Ta› eru tær kommunalu umsitingarnar, i› taka sær av barnaverndarmálum, har foreldrini samtykkja og serligar nevndir, i› taka sær av málum, har foreldrini ikki samtykkja.

– Í Íslandi eru barnaverndarmál ikki b‡tt í tvey, sum í Danmark og Noregi, men ein lógarbroyting er á veg, sum væntandi fer at vi›føra, at ein líknandi nevnd, sum norska fylkisnevndin, ver›ur stovnsett í Reykjavík vi› tí uppgávu, at vi›gera øll barnaverndarmál í Islandi, har foreldrini ikki samtykkja at avger› ver›ur tikin, stendur í frágrei›ingini frá Almanna- og heilsumálast‡rinum.

Umskipast

Vi›víkjandi teim uppl‡singum og kanning, sum Almanna- og heilsumálast‡ri› hevur gjørt, ver›ur sagt í frágrei›ingini, at semja er um, at tørvurin er stórur at skipa umsitingina av barnaverndarmálum av n‡ggjum í Føroyum.

– Avger›ir ver›a tí›um tiknar á tilvildarligum grundarlagi, tí ney›ugar kanningar og málsvi›ger› ver›ur ikki gjørd, at barnaverndarlimir eru ógegnigir í fleiri málum og kenna seg tr‡stan av bygdafólki til at taka a›ra avger› enn ta, sum nevndin er komin fram til og heldur vera rætta.

– Stø›an í dag er ein bági fyri rættartrygdina bæ›i hjá foreldrum og børnum og sigast kann, at skipanin, sum hon virkar í dag, er í mótstrí› vi› upprunaliga endamáli› vi› lógini, nevniliga at verja børn í okkara samfelag, i› ikki hava ta› gott.

Ni›urstø›an í frágrei›ingini er tí, at barnaverndarøki› má skipast á ein ø›rvísi hátt. Og mælt ver›ur til, at barnaverndarnevndirnar ver›a um ikki avtiknar, so samansettar av fakfólki og leikfólki, og ikki sum nú bara av leikfólki, og at sama nevnd ikki skal taka avger›ir bæ›i í álvarsligum málum og minni álvarsligum málum.

Og mælt ver›ur eisini til, at ein høvu›sbarnaverndarnevnd ver›ur sett fyri alt Føroyar, og at økisbarnaverndarnevndir ver›a settar kring landi›.

Frábo›anarskyldan hjá fakfólkunum ver›ur ikki hildin

Frábo›anarskyldan er fyritreytin fyri, at barnaverndarmyndugleikar gerast varugir vi› ein trupulleika so skjótt sum gjørligt, og kunnu seta tiltøk í verk yvirfyri barninum og familjuni so tí›liga sum gjørligt

BARNAFORSORGARLÓGIN
Ólavur í Beiti

Í frágrei›ingini frá Almanna- og Heilsumálast‡rinum um Barnaforsorgina í Føroyum nú ætlanin er at gera broytingar í lógarverkinum, ver›ur eisini norti› vi› frábo›anarskylduna, og ver›ur sagt, at sambært barnaforsorgarlógini hava tænastumenn og fólk í almennum álitisstørvum, sum í starvi sínum varnast vi›urskifti, sum eftir teirra tykki krevja, at almennur myndugleikar taka um endan, skyldu til at bo›a barnaverndini frá.

– Harumframt hevur hvør einstakur borgari í Føroyum skyldu til at bo›a barnaverndarnevndini frá, um tey meta, at eitt barn livir undir vi›urskiftum, i› kann ska›a teirra heilsu og menning.

Grannar

Men sambært teimum samrø›um og fundum i› umbo› fyri Almanna- og heilsumálast‡ri› hevur gjørt, stava trupuleikarnir vi›víkjandi frábo›anarskylduni í høvu›sheitum frá, at fakfólk ikki halda frábo›anarskylduna. Frábo›anin kemur ofta frá einum granna ella familjuni. Um frábo›anin kemur frá einum fakfólki, er ta› sum oftast frá eini heilsusystir, ver›ur uppl‡st í frágrei›ingini.

Og heilsusystrarnar eru av tí fatan, stendur í frágrei›ingini, at barnaverndarnevndirnar ofta ikki eru førar fyri at taka avger›ir, tí limirnir eru ógegnigir í málunum. Hetta ger ta› trupult hjá heilsusystrunum at frá-bo›a til barnaverndarnevndirnar, tí royndirnar tær hava er, at eingin vi›ger› fer fram í málinum, og tí kann ein frábo›an ska›a barni› meira enn ta› hjálpir, halda heilsusystrar sambært frágrei›ingini.

Eisini starvsfólkini á dagstovnunum eftirl‡sa, at barnaverndarnevndin fylgir málinum upp, og hevur eftirlit vi› barninum, tá ta› almenna er komi› inn í máli.

Kommunulæknar

Í frágrei›ingini ver›ur sagt um kommunulæknarnar at tær barnaverndarnevndir, i› Almanna- og heilsumálast‡ri› hevur veri› í sambandi vi›, høvdu onganti› fingi› nakra frábo›an frá kommunulæknum.

– Tá børnini koma til læknan, er sera trupult hjá læknanum at skilja millum, um børnini eru ótrygg vi› stø›una, at ver›a kanna›i, ella um ótryggleikin skildast naka› anna›. Um kommunulæknin skuldi sæ› dømi um vanrøkt, bló›skemd, har›skap ella anna›, so frábo›ar hann til barnaverndarnevndina, tí ta› skal hann gera sambært læknalógini. Men sambært kommunulæknanum er spurningurin, hvar marki› gongur ímillum vanrøkt og ikki vanrøkt.

– Kommunulæknar halda ikki, trupulleikar ver›a loystir vi› at gera eina stranga frábo›anarskyldu fyri fakfólk. Ta› vil føra vi› sær, at tær familjur sum hava trupulleikar, sum kunnu loysast sambært barnaforsorgarlógini, halda seg burtur frá kanningum hjá kommulæknanum. Tá er ta› betur, at hesar familjur fáa ta hjálp, sum fáast kann frá kommunulæknanum, sjálvt um hesin ikki frábo›ar ví›ari til barnaverndarnevndina, stendur í frágrei›ingini.

Ov langa tí›

Vi›víkjandi lærarum, sum Almanna- og Heilsumálast‡ri› hevur tosa› vi›, ver›ur sagt, at ta› er trupult hjá lærarum at varnast, um børn ikki hava ta› gott, tí børn eru sera loyal yvirfyri foreldrunum.

– Ta› nyttar tí sjáldan hjá læraranum at tosa vi› børnini. Lærarir frábo›a heldur aldrin til barnaverndarnevndirnar, uttan at ta› eru heilt álvarslig tekin um misrøkt. Lærarar eru eisini av tí fatan, at barnaverndarskipanin ikki virkar nóg væl, og at ta› tekur ov langa tí›, á›renn naka› hendir í málum, sta›festir frágrei›ingin frá Almanna- og Heilsumálast‡rinum um Barnaforsorgina.